## Brúktbilasølan

**Mercedes 300 turbodiesel**



3,0 6-cyl. 147 hk, árg. 05/1992, 152.000 km, svartmetallic. Bilurin er innfluttur brúktur úr Týsklandi og er í sera góðum standi

**Toyota Avensis 1,8i Terra**



1,8, 110 hk, árg. 11/1999, 12.000 km., reyður. Bilurin er sum nýggjur

**VW Golf diesel**



1,9D, 64 hk, árg. 04/1994, 177.000 km., myrkabláur. Bilurin er innfluttur brúktur úr Týsklandi og er í sera góðum standi

**VW Golf turbodiesel**



1,9TD, 75 hk, árg. 10/1995, 168.000 km., grønmetallic. Bilurin er innfluttur brúktur úr Týsklandi og er í sera góðum standi

*Innfluttir bilar verða handaðir nýsýnaðir við 3. mðr. garanti!*
*Myndir og upplýsingar annars kunnu fáast við posti ella e-mail*

**JB-BILAR**

Hoyvíksvegur 66 - Postsmoga 253 - FO-110 Tórshavn
Tel. 217566 & 217567 - Fax 318722 - E-mail: jb-bilar@post.olivant.fo

*Audi - BMW - Ford - Mercedes - Opel - Volkswagen*



## Bygningur til leigu

**Niðara hædd í bygningi við ringvegin (Landavegur/Velbastaðvegur) er til leigu**

550m² kunnu leigast í einum ella í smærri eindum.

Hølini kunnu nýtast til ymisk endamál. Sum nú er, eru 4 skrivstovur, eitt framsýningarhøli og goymsluhølir. Hæddin er uml. 3,30 m. Hevur verið nýtt til bilaframsýning og sølu. Møguleika er eisini at innrætta eftir ynski.

Bygningurin liggur væl fyri við góðum parkeringsmøguleikum.

Er áhugi, vinaliga ringið **tel. 317300 ella 217300.**

Sosialurin - 311820



## MÁLING

**Veggjamáling silkiglans 10 ltr.**

**449,-**

**FYRSTAFLOKS VEGGJAMÁLING**

**máling & gólv**

**Við Landavegin**
**Tórshavn • Tel. 31 60 66**






Fáast í tínum klædnahandli

DA FA Tel. 319591



**Brúkt Mustad egningarmaskina til sølu, góð 9 og 11 mm lína fylgir við.**
**Eisini hava vit brúktar og nýggjar saltsproytur til sølu.**

**SAM** *trade*

Sundsvegur 11, FO-100 Tórshavn
Tel 32 16 66, Fax 31 17 66
Fart. 21 38 00
e-mail: sjj@post.olivant.fo






**Knæsokkar fra DIM**

Tann breiði elastikkanturin forðar fyri merkjum á beinunum og ger at sokkurin passar perfekt

Fáast í tínum klædnahandli

DA FA Tel. 319591


# Føroyski happadrátturin

## 3. dráttur

**drigin 27.11.2000**

| | | |
|---|---|---|
| **250.000 kr.** | 12991 | 1/1 seðil sølustaður: Havn |
| **75.000 kr.** | 11761 | 1/2 seðlar sølustaður: Klaksvík/Runavík |
| **60.000 kr.** | 5678 | 1/1 seðil sølustaður: Tvøroyri |
| **30.000 kr.** | 13307 | 1/1 seðil sølustaður: Runavík |
| **25.000 kr.** | 3559 | 1/1 seðil sølustaður: Sørvágur |
| **25.000 kr.** | 7115 | 1/1 seðil sølustaður: Vágur |
| **15.000 kr.** | 2234 | 1/1 seðil sølustaður: Klaksvík |
| **15.000 kr.** | 8724 | 1/1 seðil sølustaður: Havn |
| **15.000 kr.** | 9977 | 1/1 seðil sølustaður: Havn |
| **10.000 kr.** | 3219 | 1/1 seðil sølustaður: Leirvík |
| **10.000 kr.** | 4586 | 1/2 seðlar sølustaður: Vágur/Havn |
| **10.000 kr.** | 4749 | 1/1 seðil sølustaður: Gøta |
| **10.000 kr.** | 5325 | 1/2 seðlar sølustaður: Vágur |
| **10.000 kr** | 5581 | 1/1 seðil sølustaður: Sørvágur |
| **10.000 kr.** | 6788 | 1/1 seðil sølustaður: Sørvágur |
| **10.000 kr.** | 11772 | 1/2 seðlar sølustaður: Havn |

**5.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4137 | 4758 | 5161 | 6474 | 7431 | 7937 | 9109 | 9477 | 9699 |
| 9762 | 10124 | 10434 | 12493 | 12619 | 13191 | | | |

**3.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1285 | 3349 | 3596 | 4498 | 5727 | 6071 | 6664 | 6823 | 7829 |
| 9652 | 10057 | 10207 | 10369 | 11174 | 12476 | 12722 | 12876 | 13094 |
| 13702 | 14434 | | | | | | | |

**2.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 933 | 1243 | 1322 | 1434 | 1536 | 1631 | 1892 | 2374 | 2432 |
| 2531 | 2539 | 2804 | 2863 | 3239 | 4200 | 4888 | 5157 | 5209 |
| 5627 | 5652 | 5848 | 6022 | 6316 | 6338 | 6459 | 6509 | 7089 |
| 7131 | 7265 | 7412 | 7536 | 7611 | 7637 | 8067 | 8095 | 8133 |
| 8417 | 8554 | 8668 | 9814 | 10448 | 10453 | 10618 | 11510 | 12533 |
| 12853 | 12998 | 13184 | 13245 | 13582 | 13621 | 13670 | 13680 | 14100 |
| 14120 | | | | | | | | |

**1.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 120 | 198 | 361 | 379 | 565 | 738 | 806 | 854 | 901 |
| 927 | 1052 | 1130 | 1224 | 1302 | 1523 | 1733 | 1748 | 1889 |
| 1965 | 2045 | 2050 | 2069 | 2293 | 2493 | 2521 | 2552 | 2577 |
| 2623 | 2754 | 2897 | 3070 | 3391 | 3428 | 3482 | 3598 | 3755 |
| 3796 | 3854 | 3888 | 3938 | 4212 | 4244 | 4278 | 4339 | 4712 |
| 4831 | 5015 | 5025 | 5048 | 5094 | 5254 | 5308 | 5424 | 5597 |
| 5872 | 6057 | 6058 | 6170 | 6215 | 6225 | 6420 | 6526 | 6593 |
| 6820 | 6867 | 6947 | 6964 | 7028 | 7328 | 7361 | 7555 | 7572 |
| 7857 | 7992 | 8018 | 8287 | 8363 | 8740 | 8937 | 9097 | 9179 |
| 9284 | 9313 | 9446 | 9549 | 9664 | 9787 | 9890 | 10070 | 10147 |
| 10432 | 10605 | 10911 | 10926 | 11069 | 11214 | 11681 | 11703 | 11726 |
| 12038 | 12191 | 12259 | 12306 | 12758 | 12780 | 12857 | 12975 | 13142 |
| 13293 | 13303 | 13637 | 13716 | 13825 | 13879 | 13947 | 13985 | 14003 |
| 14133 | 14176 | 14396 | 14429 | 14431 | 14527 | | | |

**500 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 326 | 373 | 492 | 518 | 752 | 914 | 924 | 931 | 994 |
| 1164 | 1176 | 1190 | 1226 | 1337 | 1409 | 1471 | 1580 | 1581 |
| 1785 | 2014 | 2073 | 2135 | 2198 | 2199 | 2241 | 2314 | 2408 |
| 2426 | 2427 | 2494 | 2508 | 2574 | 2600 | 2635 | 2652 | 2737 |
| 2749 | 2777 | 2855 | 2909 | 2924 | 3020 | 3027 | 3038 | 3200 |
| 3323 | 3330 | 3340 | 3414 | 3517 | 3641 | 3905 | 4075 | 4096 |
| 4178 | 4180 | 4301 | 4360 | 4416 | 4483 | 4502 | 4543 | 4702 |
| 4728 | 4731 | 4774 | 4816 | 4859 | 4946 | 4989 | 5160 | 5253 |
| 5269 | 5299 | 5312 | 5316 | 5326 | 5338 | 5386 | 5397 | 5486 |
| 5502 | 5518 | 5542 | 5561 | 5664 | 5749 | 5765 | 5815 | 5877 |
| 5997 | 6007 | 6111 | 6279 | 6332 | 6475 | 6490 | 6584 | 6634 |
| 6705 | 6740 | 6888 | 6892 | 6979 | 7002 | 7078 | 7175 | 7296 |
| 7355 | 7435 | 7474 | 7654 | 7670 | 7789 | 7796 | 7848 | 7877 |
| 8041 | 8081 | 8321 | 8327 | 8375 | 8403 | 8463 | 8471 | 8517 |
| 8748 | 9030 | 9091 | 9311 | 9362 | 9407 | 9417 | 9419 | 9468 |
| 9510 | 9568 | 9572 | 9789 | 9792 | 9866 | 9906 | 9950 | 9951 |
| 9962 | 9985 | 10244 | 10323 | 10339 | 10341 | 10344 | 10454 | 10516 |
| 11031 | 11037 | 11059 | 11071 | 11190 | 11213 | 11264 | 11411 | 11731 |
| 11739 | 11819 | 11862 | 12073 | 12158 | 12300 | 12325 | 12351 | 12385 |
| 12393 | 12497 | 12605 | 12795 | 12918 | 12971 | 13010 | 13056 | 13156 |
| 13212 | 13271 | 13374 | 13375 | 13433 | 13436 | 13555 | 13616 | 13841 |
| 13901 | 13925 | 13961 | 14216 | 14292 | 14317 | 14439 | 14473 | 14494 |

Eykavinningur 15.000 kr. 9950 - 1/1 seðil - sølustaður: Havn

Vinningarnir verða útgoldnir beinanvegin við frádrátti av 15% gjaldi til landskassan, av ti parti av vinninginum, sum er omanfyri 3.000 kr.
Vinnararnir verða bidnir um at venda sær til happadráttarseljarar sínar
Vinningur má avheintast áðrenn 6 mánaðar frá dráttardegnum.

**Føroya landsstýri**
27.11. 2000
(Happadrátturin)

Dráttarlistin er eisini á heimasíðuni hjá Elektron: HTTP://www.elektron.fo

www.sosialurin.fo

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 1. desember til hósdagin 8. desember

## Robinson: Finalan




Skráin hjá TV3 í næstu viku verður eitt sindur merkt av, at Robinson Ekspeditiónin nú syngur sítt síðsta ørindi á hesum sinni.

Mánakvøldið fáa hyggjararnir at vita, hvør hevur vunnið tær 250.000 krónurnar. Komið er fram til finaluna, og hyggjararnir kunnu vera við til at avgera, hvør skal vinna. Lagt verður til brots klokkan 18.30 og sendingin varar í hálvantriðja tíma.

Týskvøldið verður Thomas Mygind, sum hevur staðið fyri Robinson Ekspeditiónini, aftur at síggja á sjónvarpsskíggjanum. Tá hevur hann fingið allar luttakararnar í sjónvarpsstovuna, har teir fara at greiða frá, hvussu henda upplivingin hevur verið, og hvørja ávirkan hon hevur havt á teirra privata lív.

## Lokalu sekundini



**Dagfinn Olsen ummælir:**

Bygda- og býráðsval hava merkt loftmiðlarnar. Bæði undan og eftir valkvøldið. Samanumtikið eiga bæði Útvarpið og Sjónvarpið rós fyri væl avgreitt valkvøld. Manning á øllum størri plássum og kunning frá eygleiðarum á øðrum plássum. Jú, víst fingu lurtarar og hyggjarar dygga kunning, so hvørt sum dagur tók at halla, og úrslitini gjørdust greið.

»Ja, nú var tað, at havnarfólk skuldu havt eina lokalrás!«

Hesa viðmerking hoyrdi eg nakrar dagar eftir valið. Tað var, sum eg vaknaði. Staddur uttan fyri Havnina og millum fólk á staðnum kom dátt við hjá mær sum havnarmanni at hoyra hesa viðmerking, men eg kundi bert geva viðmerkjaranum rætt.

Útvarp Føroya savnar ein stóran part av føroyingum á middegi hvønn dag, tí tá eru tíðindi at frætta.

Men henda dag fór bróðurparturin av tí altíð ov stutta døgurðatímanum við, at Útvarpið leitaði sær oman í býráðssalin í Havn til ein tíðindafund, har einki stórvegis hendi, sum ikki kundi verið tikið samanum við fáum orðum. Nýggi býráðsformaðurin í høvuðsstaðnum las upp eitt tíðindaskriv. Kjakast kann aftur og fram um, hvørt neyðugt var at varpa beinleiðis frá hesi løtu. Gamaní, nýggjur borgarstjóri í høvuðsstaðnum og so framvegis. Men ein staðfesting er tað so, at hjá teimum, ið ikki beinleiðis hava tilknýti til nevnda býráðssal, var hetta nakað, sum fór inn ígjøgnum eina oyrað og beinleiðis út hinumegin. Alt ov leingi og óstrukturerað – helst lættari at gloypa afturvið døgurðanum, um tikið bert varð samanum.

Og hevði Útvarpið hesa løtu havt eina aðra rás, eina Rás Tórshavn, so hevði hetta verið hóskandi at sent har. (Kanska nakað hjá Rás 2 at hugsa um, men hon hoyrist jú eisini langt út um Havnina).

Men alt samalt slíkt, ið ein kanska hevur ilt við at síggja, er ein sjálvur staddur innanbýggja í Havn. Hevði viðmerkingin á bygd ikki komið mær fyri oyrað, so skal eg ikki halda uppá, at eg hevði hugsað um hetta. Viðvíkjandi bygd og bý er og verður tað ein metingarsøk hjá redaktiónini og ikki er altíð lætt at fóta sær í hesi javnvágsgonguni. Kanska er alt hetta grenj um smálutir, kanska ikki. Og betur er bøtandi hond, enn spillandi tunga, so lat okkum bert staðfesta, at vert er at hava slíkt í huga.

Veit ikki hvussu vakurt tað er, soleiðis at hála eina hending fram, men hon festi seg so í mín huga í vikuni, tí kanska er hetta ikki einasta dømið um, at loftmiðlamikrofonirnar ikki røkka líka langt, sum sendibylgjurnar.

Ná, men tá alt kemur til alt, so eiga loftmiðlarnir jú rós fyri háttin, teir avgreiddu bý- og bygdarráðsvalini.

Men bíði mær líka eitt bil. Meðan vit eru í hesum bý- og bygdahorninum, so legði eg til merkis í sendingini Svf um Svf, at sagt varð nakað soleiðis um innslag í komandi sendingini Basalt: "Og røddirnar í Bønarløtunum í Lindini kenna vit jú øll".

Útvarpsstøðin Lindin hoyrist ikki (enn) kring alt Føroyaland, so ein kann ivast, hvussu rætt tað er, at øll kennast við hetta!?! So fingu vit tað við eisini.

Ná, men nú skal ansast eftir, at alt ikki endar við grenji.

Vit fylgja tráðnum og staðfesta, eins og áður, at Basalt er flaggskipið hjá Svf. Støðugt góðar sendingar, ja, framúr. Og bæði programmfólk og tøkniliga harkaliðið vísa sínar dygdir og nýggjar, nýmótans leiðir. Veruliga flottar sendingar.

Nýggja sendiskrá Útvarp Føroya er so smátt við at seta seg í mergin. Mong fegnast helst um, at nú er aftur gjørligt at hoyra brot úr morgunsendingini á kvøldi. Vikuskiftiskvøldini eru broytt, so vit nú hava undirhald bæði fríggjakvøld og leygarkvøld (umframt frálíku sendingarnar úr Pegasus í Klaksvík sunnukvøld). Tað hevði tó glett mangan við mær, um útvarpsvertirnir í samband við spurnarkappingarnar ikki javnan søgdu, at so og so nógv "sekundir" eru eftir. Tað eitur jú sekund! Heilt einfalt! Og tað eigur ikki at taka mong sekund (!) at lúka slíkt burtur.

## Jalla-jól




## Ghostbusters II




## Síðsti maður á Skarvanesi




## James Bond: Tomorrow Never Dies

